Fróðskaparsetur Føroya

24. februar 2005

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 2/2005**

Tíð: Hósdagin 24. februar 2005, kl. 13.00-14.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av setursráðsfundi 27. januar 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarstýring.** (J.nr. 0015-01377). *Fundarskjal: Notat frá setursskrivaranum, dagfest 23.2.05, 4 s.* Semja um at málið eigur at verða viðgjørt á serligum fundi saman við roknskaparleiðaranum og deildarskrivarunum. Fundur verður mánadagin 28.2.05 kl. 13 á Setursskrivstovuni.

4. **Uppskot um broyting av próvdómarasamsýningum.** (J.nr. 0015-01010). *Fundarskjøl: Viðmerkingar frá deildunum.* Tilfarið frá deildunum komið so seint inn, at ikki bar til at taka støðu á fundinum. Setursskrivarin ger uppskotið liðugt saman við skrivarunum, verður síðani lagt fyri setursráðið.

5. **Uppskot til viðtøkur fyri Fróðskaparsetur Føroya.** (J.nr. 0015-00003). *Fundarskjal: Uppskot til viðtøkur, dagfest 21.2.05 ,4 s.* Umrøddu onkur ivamál, sum setursskrivarin kannar. Málsligar rættingar gjørdar. Uppskotið samtykt.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

6. **Áheitan frá Tórshavnar Býráð um at velja lim í nevndina til M.A. Jacobsens virðislønina fyri tíðarskeiðið 2005-2009.** (J.nr. 0011-01535). Samtykt at velja Onnu Mariu Fossaa vegna Fróðskaparsetrið.

7. **Hvussu skal 40 ára stovningardagur Fróðskaparsetursins 20. mai 2005 markerast?** (J.nr. 0017-01551). Uppskot um at skipa fyri fyrilestrarrøð: “Setrið á ferð” í vár í sambandi við føðingardagin. Undirtøka fyri uppskotinum. Semja um at hava almenna móttøku um dagin, møguliga onkran fyrilestur eisini. Halda veitslu um kvøldið fyri øllum starvsfólkum. Setursskrivstovan arbeiðir víðari við málinum.

8. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 11.2.05.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 15.2.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Eftir tilmæli frá megindeildarráðnum á Søgu- og Samfelagsdeildini er Mentamálaráðið biðið um hesar próvdómaragóðkenningar: Agnes S. Arnórsdóttir, cand.mag., lektari á Institut for Historie og Områdestudier á Aarhus Universitet í *Søgu* og Rógvi Thomsen, læraraskúlalærari, Tórshavn í *Søgu*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**Kunningarmál:**

10. **Mánaðarjavni desember 2004, 1. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt setrið 18.117.600 kr = 98,7% av játtanarkarmi uppá 18.358.000 kr.** (J.nr. 0015-01111).

11. **Viðlíkahald/umvælingar 2005, játtan 320.000 kr. Á Føroyamálsdeildini: Liðugtgerð at hitaskipanini, mála vindeygu og karmar í Loftsstovu, gongd í erva, WC og skúlastovan málast. Á Søgu- og Samfelagsdeildini: Húsini málast innan, luftinntak gerast í fýrrúminum, og kaminan skal isolerast. Rein-húsið: Tekjan skal skiftast, fyri fyrst verður biðið um tilboð.** (J.nr. 0015-01370).

12. **Ráðstevnur:**

   a. **NUAS-seminar í Reykjavík 28.-31.5.05 “Finansiering och effektivisering”.** (J.nr. 0014-01549).
   b. **18. altjóða ráðstevna um hægri útbúgvingar í Ankara, Turkalandi 26.-28.8.05 “Strenghts and Weaknesses of Public and Private Universities”.** (J.nr. 0057-00155).

**13. Yvirlit yvir ráðini á Fróðskaparsetrinum.**

**14. Frágreiðing frá Lottu Numminen úr Finnlandi um uppihaldið í Føroyum aug.04-feb.05. Lotta fekk námsferðarstuðul í 2004.** (J.nr. 0071-01126).

Frágreiðing: Annika Sølvará